
ÍTRÓTTAR Sosialurin



VB OG FØROYA BANKI *hava skrivað undir nýggja sponsor-avtalu. Suðuroyar Sparikassi hevur í mong ár verið sponsor hjá felagnum, men Føroya Banki bjóðaði hægri. Eftir hvat skilst missir VB ikki sponsor-stuðulin frá sparikassanum: hann fer til lægru deildirnar, meðan 3. deildarliðið fær gomlu troyggjurnar. Á myndini síggjast Hjørleif Splidt frá Føroya Banka og Julius Vest, formaður í VB*

Jørleif til Kyndil

Tað er longu so gott su greitt, at kyndlakvinnurnar fáa nýggjan venjara. Jørleif Kúrberg, sum hevur vant VÍF-menninar tvey ár á rað, skal loysa Áka Davidsen av sum venjari hjá kyndlakvinnunum.

Hetta var avgjørt á leikarafundi hjá Kyndli mikukvøldið. Hann skal eisini venja kvinnuunglingarnar, sum koma at venja saman við kvinnunum.

Kyndlakvinnurnar verða tær somu komandi kappingar-ár, burtursæð frá Anju Perdomo, sum fer til Danmarkar.



EB. Vinnarar av old boys-kappingini 1990. Aftast frá vinstru: *Kári Mørkøre, Hans Egil Joensen, Knút Vesturdal, Eyðbjørn Mørkøre, Edvard Pauli Eidesgaard og Regin Ellingsgaard.* Fremst: *Petur Kruse, Tórur Jacobsen, Artur Ellingsgaard, Magnus á Stongum og Petur Sólsker*





Øll á grasi

Útvarpið visti í gjár at siga, at miðvingar eru farnir til Týskalands at keypa graslíki til fótbóltsvølli.

Myndin er frá dystinum á Tvøroyri í fjør millum TB og MB. TB fekk graslíkisvøll í fjør, so við MB-grasinum fara allir 1. deildardystir at verða leiktir á grasi í ár.



Arnbjørn Sivertsen

Bridge

Her skulu vit siggja Helga Joensen snúgva sær í einari so at siga ómøguligari kontrakt. Tað ger ikki spælið minni áhugavert, at tað sindrið av hepni, sum so ofta skal til, var til staðar.

E/E-V

	♠ 10-8-2 ♡ 7-3 ◇ J-9-6 ♣ Q-8-7-5-3	
♠ 5 ♡ J-9-6 ◇ K-7-4-3-2 ♣ J-10-9-4	N V E S	♠ K-Q-J-9-7-3 ♡ Q-8-5-2 ◇ 10-8 ♣ A
	♠ A-6-4 ♡ A-K-10-4 ◇ A-Q-5 ♣ K-6-2	

E	S	V	N
Rúni M.	Hélgi J.	Jóannes M.	D.P. Mohr
1 sp	D	pass	2 kl
2 hj	D	pass	3 kl
pass	3 ut	pass	pass
D	pass	pass	pass

Útspæl: hj 6

Helgi var komin í eina grótharða kontrakt. Fekk hann spaðara út frá Jóannesi, vóru allar vónir sløktar beinanvegin! Man ikki Jóannes hevur mett spaðarahaldið hjá Helga verið eitt sindur sterkari?

Helgi takkaði (innantanna) fyri útspælið, og hj 6 fóru um frúnna til essið. Skal kontraktin hava bert ein litlan møguleika at vinna, skulu kortini sita á onkran serligan hátt. Helgi royndi fyrst við kl 2, Jóannes legði niggjuni og Helgi triini av borðinum! Tað einsamalla essið hjá Rúna fall! Rúni sendi sp Q avstað, og hana slapp hann at eiga. Síðan skifti hann til hj 2, sum Helgi tók við konginum — hann legði til merkis, at hj 9 fullu. Nú tók hann kl K, spældi lágan kleyvara til frúnna og enn ein kleyvara, sum fór til dreingin hjá Vestri.

Støðan var hendan — Helgi hevði fingið fýra stingir og skuldi hava fimm afturat.

	♠ 10-8 ♡ - ◇ J-9-6 ♣ 8	
♠ - ♡ J ◇ K-7-4-3-2 ♣ -	N V E S	♠ K-J ♡ 8-5 ◇ 10-8 ♣ -
	♠ A ♡ 10-4 ◇ A-Q-5 ♣ -	

Jóannes (Vestur) var inni, tók fyri hj J og noyddist síðan at spæla út frá rútaralitinum, rú 2 til dreingin, og borðið var inni. Nú fekk Helgi fyri kl 8 og kastaði rú Q. Sp A, rú A og hj 10 á hondini bóðu um restina.

Við hitt borðið — hetta var í innanhýsis liðkappingini hjá Bridgedeild Kaggans — høvdu Petur Reinert og Edmund Joensen við EV kortunum spælt 2 sp D +3! 3 ut D + 3 góvu 550, og 2 sp D +3 góvu 870 = 1420 og eitt 16 tal. Einki hjálpti kortini, teir taptu dystin 25—4, men hetta var í øllum førum snøgt spælt av Helga.